gult cyan magenta svart

Nýggi Smyril verður 115 metrar langur

Arbeiðið at projektera hann er klárt at bjóða út, men av praktiskum orsøkum verður bíðað til summarfrítíðin er av, sigur Strandferðslan

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er nú greitt, at arbeiðið at projektera ein nýggjan Smyril til siglingina ímillum Suðuroynna og Havnina, verður boðið út í næsta mánaða.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at arbeiðið er mestsum klárt at verða bjóðað út, men at tað verður bíðað við tí til aftaná summarfrítíðina.

Tað er av praktiskum orsøkum, at bíðað verður til aftaná summarfrítíðina.

– Tey, sum skulu bjóða upp á arbeiðið fara í summarfrí. Og á Strandferðsluni fara bit eisini í summarfrí nú. So hava teir, sum skulu bjóða, okkurt at spyrja um, er ongin á stovninum at svara teimum, sigur Magnus Magnussen.

Hann sigur, at tí verður arbeiðið boðið út um hálvan august í staðin.

Hann sigur, at arbeiðið verður boðið út í Føroyum, í Danmark og í Noregi.

Tað er eisini av praktiskum orsøkum, at arbeiðið verður boðið út í okkara grannalondum.

–Skipasmiðjurnar í hesum londunum er tær, sum eru best kunnug við tey krøv, sum verða sett til skip her um okkara leiðir, og tí er tað lættari at fáa arbeiðið gjørt í londunum rundanum okkum.

Á fíggjarlógini í ár eru 400.000 krónur settar av til at projektera nýtt suðuroyar skip fyri.

Magnus Magnussen sigur, at tað er ikki nakað stórt projekt, sum fæst fyri tann peningin, so hann veit ikki, sum tað fer at røkka til.

– Røkkur tað ikki til, at má Strandferðslan so royna at útvega peningin, sum manglar í, sigur hann

Magnus Magussen sigur, at teir, sum skulu bjóða upp á projektreringina, fáa einar fimm vikur, so tilboðini skulu vera inni aftur seinast í september.

– So verður støða tikin til, hvør fær arbeiðið at projektera skipið og so skuldi tað gingið slag í slag.

Væntandi er tí, at sjálv byggingin kann byrja næsta ár. Skipið skuldi sostatt verið liðugt í 2003, ella seinast í 2004.

Tann nýggi Smyrilin, sum ætlanin er at byggja, verður yvir 20 metrar longri enn tann, sum er og hann fer at hava meiri enn hálvan tíma skjótari ímillum Tvøroyri og Havnina

115 metrar langur

Tað nýggja suðuroyarskipið, sum nú liggur í kortunum, er eitt sindur broytt afturímóti tí, sum varð lagt fram fyri almenninginum á fundi í Øravík seinata heyst.

Tá varð tosað um eitt skip, sum varð um 100 metrar langt og sum sigldi 18 míl.

Aftaná varð nógv funnist at, at skipið ikki skuldi sigla skjótari, tí tað er bara 1,5 míl skjótari enn Smyril, sum er, tí hann siglur 16,5 míl.

Síðani hevur Strandferðslan, í samráð við suðuroyingar, broytt ætlanina, so at nú er ætlanin, at tað nýggja suðuroyarskipið skal sigla 21 míl.

Tað broytir so eisini skipið eitt sindur, so nú er talan um eitt skip, sum er um 115 metrar langt.

Eitt slíkt skip fer at hava eitt lítið sindur meiri enn hálvan annan tíma ímillum Tvøroyri og Havnina.

Tað er meiri enn ein hálvan tíma skjótari, enn Smyril, sum nú er, tí hjá honum er hvør túrur settur at taka 2,15 tíma.

Annars fer nýggi Smyril ikki at taka stórt fleiri ferðafólk enn hesin ger, tí tann orkan er nóg stór.

Men tað er serliga biladekkið á hesum Smyrlinum, sum er alt ov lítið. Nýggi Smyril fer tí at taka um 200 bilar afturímóti teimum 110, sum hesin tekur.

Somuleiðis verður biladekkið væl hægri enn tað er á hesum Smyrlinum.

Og ikki minst verða umstøðurnar hjá ferðafólkið, sum skulu umborð, ella í land eftir biladekkinum, munandi betri.

Í nýggja Smyrlinum verða nevniliga gongubreytir á biladekkinum so at fólk sleppa undan at skotrast og trokast ímillum bilarnar til stórt forargilsi, bæði hjá teimum sjálvum tí tað dálkar klæðini so illa, og hjá teimum, sum eiga bilarnar, tí teir verða so illa skøvaðir.

Annars er ferðafólkatlið við Smyrli nógv vaksið seinastu árini.

Í 1997 flutti Smyril 109.891 ferðafólk ímillum Suðuroynna og Havnina. Í 1998 var talið komið upp á 117.28 ferðafólk.

Sama gongdin er í talinum á akførum. Í 1997 flutti Smyril 32.054 akfør ímillum Suðuroynna og Havnina, í 1998 flutti hann 35.711 akfør. Tað hevur ikki eydnast at fáa tølini fyri í fjør, tí tey høvdu onkrar smávegis tekniskar trupulleikar á Strandferðsluni.

Máttu rýma undan toski

Lemmatrolararnir hava havt rokfiskarí vestanfyri, men teir máttu rýma, tí hjáveiðan av toski var alt ov stór

ÁKI BERTHOLDSEN

Lemmatrolararnir, sum hava verið vestanfyri Mykines, hava havt rokfiskarí herfyri.

Men tíverri fyri teir, var so nógvur toskur uppi í, at teir vóru noyddir at rýma.

Bæði Jósup Henriksen, skipari á Vesturskin, og Sigurd Simonsen, reiðari á Boðasteini, siga, at fiskiskapurin var so góður, sum teir sjálvdan minnast hann áður.

Skiparin á Vesturskini sigur, at teir hava fingið heilt upp í 400 kassar í hálinum.

Tað mesta av tí var upsi, men tað var eisini so nógvur toskur uppi í, at tað var onki annað at gera, uttan at rýma.

Tað sama hava teir flestu av hinum lemmatrolarunum, sum vóru á leiðini, eisini verið noyddir til at gjørt.

Lemmatrolararnir kunnu nú bara fiska 50 tons av toski og 50 tons av hýsu hvørt hálvár.

Áður kundu teir fiskað 100 tons av hvørjum hvørt hálvár, men hetta hálvaárið frá mars til september í ár, var hjáveiðikvotan skerd 50% í einum høggi.

Og tað ger, at tað er skjótt at teir koma skjótt í trupulleikar.

Eitt nú fekk Boðasteinur 25 tons av toski upp á fimm dagar vestanfyri Mykines herfyri.

Teir máttu so bara rýma, tí teir høvdu fiskað 25 tons av toski frammanundan.

–Sostatt bar heldur ikki til hjá teimum at fiska tann upsan, sum teir hava loyvi at fiska.

Síðani hava teir reikað runt, áðrenn teir nú komu inn at avreiða tey 100 tonsini, teir høvdu í lastini.

Teir, sum vara av lemmatrolarunum, siga, at var hjáveiðiprosentið óbroytt, hevði tað borið til at sloppið eftir upsanum, sum teir hava loyvi at fiska.

Teir siga, at fyrr fingu lemmatrolararnir íløgustuðul.

Tá kundu teir hava 8% í hjáveiði av toski og hýsu, annars kundu teir fiska frítt.

Men hjáveiðiprosentið varð uppfatað sum ein stór forðing, tí tað var mangan, at teir ikki fingu fiska upsan fyri toski og hýsu, sum var uppi í.

Men politiska ynski var, at íløgustuðulin skuldi takast av, og tað var hann eisini. Samstundis fullu prosentini burtur.

Afturfyri skuldu lemmatrolararnir so fáa eina hjákvotu av toski og hýsu, sum nøkunlunda skuldi svara til tann mista íløgustuðulin.

Úrslitið var, at lemmatrolararnir fingu eina hjáveiðikvotu upp á 200 tons av toski og 200 tons av hýsu, ella 400 tons tilsamans.

Kvotan skuldi ásetast fyri hvørt hálvár ísenn, so at bátarnir kundu fiska 100 tons av toski og 100 tons av hýsu um hvørt hálvár.

Eftir avreiðingarprísunum, sum tá vóru galdandi, hevði avreiðingarvirðið av teimum 400 tonsunum so dánt svara til íløgustuðulin og tað var eisini politiska ætlanin við hjáveiðikvotuni.

– Men nú hava vit longu mist helvtina av hjáveiðikvotuni aftur, nú er hon bara 100 tons av toski og 100 tons av hýsu um árið, ella 50 tons av høvrjum um hálvárið.

–Sostatt hava vit nú hvørki íløgustuðul ella nakað serligt av hjáveiðikvotu siga teir, sum vara av lemmatrolarunum.

Sostatt staðfesta teir, sum eiga lemmatrolararnar, at teir eru blivnir alsamt meiri og meiri skerdir hesi seinastu árini.

Lemmatrolararnir fáa ikki fiska upsa fyri berum toski og tí máttu teir rýma

gult cyan magenta svart

Mangla pengar til innbúgv

Gamalt og sliti› innbúgv skal innaftur í umvældar skúlastovur í skúlanum á Ziskatrø›. Pengar eru ikki til at keypa n‡tt innbúgv fyri

EY›UN KLAKSTEIN

Tá summarfrítí›in er av, ver›a 10 av skúlastovunum í skúlanum á Ziskatrø› ikki til at kenna aftur. Skúlastovurnar ver›a í hesum døgum settar í stand, og alt skal skiftast út. Líka vi› undantaki av innbúgvinum í fimm ella seks av stovunum.

- Ta› mangla 350.000 krónur til at keypa nóg nógv innbúgv, og tí fara 40 ára gomlu stólarnir og bor›ini innaftur í helvtina av stovunum, sum annars ver›a sum n‡ggjar, sigur Jógvan Lutzen, forma›ur í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar b‡rá›i.

- Í heilagu skriftini ver›ur tosa› um at lata n‡tt vín á gamlar fløskur, og hetta er júst ta› sum hendir í skúlanum. Ta› er burturvi› at koyra gomlu bor›ini og stólarnar innaftur í høvu›sumvældu stovurnar, heldur hann.

Ein samd mentanarnevnd mælti á b‡rá›sfundinum seinasta hóskvøld til, at pengar vór›u fluttur av eini konto ætla til n‡bygging av skúlanum vi› Ósánna, so n‡tt innbúgv kundi keypast til allar 10 skúlastovurnar á Ziskatrø›.

Men b‡rá›i› í Klaksvík feldi hetta uppskoti› á fundinum, tí ta› helt ta› ikki ver›a rætt, at flyta pengar millum konti.

Mangla pengar

Skúlin á Ziskatrø›, sum er annar av fólkaskúlunum í Klaksvík, hevur fyri ney›in stórar ábøtur, tí líti› og einki er gjørt vi› skúlan nógvu seinnu árini. Onkrar skúlastovur eru gjørdar í stand, og í summarferiuni ver›a 10 stovur afturat høvu›sumvældar. N‡ggj ventilatiónsannlegg ver›a sett upp, el, gólv og loft ver›a skift út, og veggirnir ver›a settir í stand.

Á fíggjarætlanini fyri ár 2000 eru tríggjar milliónir krónur settar av til hetta arbei›i›, men hetta vísir seg nú ikki at ver›a nóg miki›. Fuglø Arkitektar, sum standa fyri arbei›num, rokna›u seg herfyri fram til, at ta› mangla 350.000 krónur til at keypa innbúgv fyri.

Máli› enda›i hjá mentanarnevndini hjá Klaksvíkar b‡rá›i, og eftir ein drúgvan fund gjørdi ein samd nevnd eitt tilmæli til b‡rá›i› um, at 350.000 krónur vór›u fluttar av eini konto ætla til n‡bygging av Ósáskúlanum til keypi› av stólum, bor›um, talvum og kortum.

Máli› fór eisini fyri fíggjarnevndina, sum hinvegin einmælt mælti frá at flyta pengarnar.

Og ta› var eisini endin á b‡rá›sfundinum seinasta hóskvøld. F‡ra b‡rá›slimir atkvøddu fyri, me›an sjey vóru ímóti tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Viljin skortar tá ástendur

Forma›urin í mentanarnevndini hjá Klaksvíkar b‡rá›i er harmur um avger›ina.

- Vit mæltu til at flyta 350.000 krónur av eini konto ætla til n‡bygging av Ósáskúlanum, sum ikki fer í gongd í ár, so n‡ggj bor›, stólar, talvur og kort kundu keypast til skúlastovurnar á Ziskatrø›. Á fíggjarætlanini fyri næsta ár skuldu pengarnir so flytast aftur til Ósáskúlan, men hetta vildi b‡rá›i› ikki, sigur Jógvan Lutzen.

- Børnini eru ta› d‡rasta tilfeingi›, sum vit eiga, og tí skal skúlin ver›a í lagi. Men tá ástendur, so er ikki nóg stórur vilji til at tryggja gó›ar umstø›ur í skúlanum, heldur Jógvan Lutzen.

- Vir›ingin fyri teimum umvældu hølunum fellir, tá ta› eru elligamlir og ni›urslitnir møblar, sum fara innaftur í stovurnar, sigur forma›urin í mentanarnevndini.

Hann sigur, at í summum før›um er eingin trupulleiki at flyta pengar millum konti, men hesafer› vildi ein meiriluti í b‡rá›num ikki gera ta›. Innbúgvi› í teimum umvældu skúlastovunum kann tí í fyrsta lagi keypast eftir ársskifti›, men spurningurin er so, hvar óbrúkta játtanin til Ósáskúlan fer, sigur Jógvan Lutzen.

Soltin føroyskur laksur lokkar evropear

Sambært norska granskingarstovniunum, Akvaforsk, er tann føroyski alilaksurin munandi soltnari enn tann norski, og hetta er ein stórur fyrimunur tá keyparar skulu finnast í Evropa vísa kanningar hjá stovninum.

Ein stórur parturin av alilaksinum, sum ver›ur sendur av landinum ver›ur royktur, og roykivirkini seta strong gó›skukrøv til, hvussu laksurin er samansettur. Turi› Mørkøre, i› arbei›ir á granskingarstovninum Akvaforsk í Noregi sigur, at føroyski laksurin passar sera væl til tey krøvini, evropeiski markna›urin krevur.

-Evropeisku roykivirkini, sum keypa laks m. a. úr Noregi og Føroyum seta strong krøv til gó›skuna. Serligur dentur ver›ur lagdur á, at fitiinnihaldi› skal vera› lágt, og at laksakjøti› skal hava ein gó›an rey›an lit. Kjøti› skal eisini vera fast. Føroyski laksurin tykist at vera sera væl fyri og lættliga passar inn í kravlistan hjá keyparunum, sigur Turi› Mørkøre.

Passaliga feitur

Kanningin, i› Akvaforsk hevur gjøgnumført í samstarv vi› fó›urframlei›aran EWOS, vísir, at føroyska vinnan ikki hevur stórvegis trupulleikar vi› at uppfylla krøvini frá evropeiska markna›inum. EWOS er ein av størstu fó›urframlei›arunum til føroyska og norska alimarkna›in. Fyritøkan er umbo›a› í Føroyum av Atla Gregersen.

Ta› eru í dag tríggjar fyritøkur, sum selja so at siga alt fó›ri› til alivinnuna. Tær eru Havsbrún vi› umlei› 45 prosentum av markna›inum, EWOS vi› umlei› 40 prosentum og Skretting vi› umlei› 15 prosentum

Me›an tann føroyski laksurin í me›al hevur eitt fitiinnihald uppá 15 prosent, er fitiinnihaldi› í norskum laksafløkum í me›al 17-18 prosent. Men me›an frábrigdi í norska laksinum er úr átta prosentum upp í 25 prosent fitiinnihald, heldur tann føroyski laksurin seg millum átta og 20 prosent.

- Ta› er serliga laksur, sum hevur meir enn 20 prosent fitiinnihald, sum er ein trupulleiki og sum evropeisku keypararnir helst ikki vilja hava, sigur Turi› Mørkøre.

Kanningin, sum Akvaforsk og EWOS hava samstarva› um, er ein samandráttur av fleiri kanningum, millum anna› eini nor›urlendskari kanning, har føroysku alilaksur eisini er tikin vi›. Turi› Mørkøre sigur, at tey hava veri› sera neyv vi› at bert at taka kanningar vi› sum kunnu samanberast. Dentur hevur millum anna› veri› lagdur á, at hesar kanningarnar skulu vísa fitiinnihald frá sama sta› á laksinum. Munur er nevniliga, hvar á fiskinum kanna› ver›ur.

Gó›an lit

Tann føroyski laksurin visir seg at hava sera tekkiligan lit meginpartin av árinum.

- Kanningarúrslitini vísa, at liturin á føroysku laksafløkunum yvirhøvur er gó›ur. Einasta árstí›in, sum er trupul, er heysti›, tá laksurin er í bleytara lagi og heldur bleikur sambært teimum krøvunum, markna›urin setur, sigur Turi› Mørkøre.

Samanbera vit føroysku alivinnuna vi› norsku, so eru líkindini í Nor›urnoreg og í Føroyum nøkulunda tey somu, og trupulleikarnir vi› gó›skuni eru líkir.

Í sunnara partinum av Noregi hava alararnir ofta trupulleikar um vári› vi› liti og fastleika.